**Kunning um persónsupplýsingar í sambandi við skráseting av vápnum**

Umhvørvisstovan umsitur vápnaskránna við heimild í Kunngerð nr. 74 frá 28. juni 2016 um skráseting av skotvápnum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 5 frá 13. januar 2021 og Kunngerð nr. 93 frá 7. september 2016 um vápnaprógv.

Vápnaskráin fevnir um:

- Skráseting av skotvápnum
- Umskráseting av skotvápnum (søla/gáva)
- Vinnulig skráseting av vápnasølu
- Umsóknir um vápnaprógv

Upplýsingarnar í vápnaskránni verða inntøppaðar av vápnaánaranum sjálvum. Eisini skulu fyritøkur, ið selja vápn, skráseta vápnið til keyparan í samband við søluni.

Umhvørvisstovan goymir teir upplýsingar, sum fólk tøppa inn tá tey skráseta eitt skotvápn. Upplýsingarnar eru hesir:

a) Navn
b) Føðingardagur og p-tal.
c) Bústaður.
d) Postnummar.
e) Býur.
f) Teldupost

Upplýsingarnar, sum verða skrásettar um skotvápnið, eru hesir:

a) Slag av skotvápni.
b) Navn á skotvápni.
c) Modell á skotvápni.
d) Seriunummar á skotvápninum. Er ikki gjørligt at lesa alt seriunummarið, so bert tann part, sum letur seg lesa.

Er eigarin løgfrøðiligur persónur, verða hesar upplýsingar skrásettar:

a) Navn ánarans.
b) V-tal.
c) Bústaður.
d) Postnummar.
e) Býur.
f) Teldupost

Einstaklingur, sum selur ella gevur skotvápn, t.e. avhending millum privat, skal umskráseta skotvápnið til nýggja ánaran. Umskrásetingin skal váttast av bæði seljara og keypara ella móttakara. Við umskráseting skulu hesar upplýsingar skrásetast:

Seljarin:

a) Navn á seljara.
b) Føðingardagur.
c) Bústaður.
d) Postnummar.
e) Býur.
f) Teldupost

Skotvápnið:

a) Slag av skotvápni.
b) Navn á skotvápni.
c) Modell á skotvápni.
d) Seriunummar á skotvápninum.
e) Skrásetingarnummarið, sum vápnið fekk, tá tað varð skrásett fyrstu ferð.

Keyparin:

a) Navn á keypara ella móttakara.
b) Føðingardagur.
c) Bústaður.
d) Postnummar.
e) Býur.
f) Teldupost

Í samband við málsviðgerðina innheintar og skrásetir Umhvørvisstovan p-talið hjá seljaranum og keyparanum í vápnaskránni. P-talið verður upplýst frá Landsfólkayvirlitinum.

Verður selt ella givið til ein løgfrøðiligan persón, skal V-talið hjá móttakaranum eisini skrásetast.

Tá søkt verður um vápnaloyvi fremur Umhvørvisstovan eina málsviðgerð. Umframt umsóknina, skal umsøkjarin hjáleggja eina aktuella revsiváttan. Revsiváttanin verður goymd í vápnaskránni.

**Hvat verða skrásettu upplýsingarnar brúktar til?**

Endamálið við vápnaskránni er at hava eitt eigarayvirlit yvir lóglig skotvápn í Føroyum. Somuleiðis hevur skráin til endamáls at goyma upplýsingar um, hvørjir persónar hava vápnaprógv.
Viðgerðin av persónsupplýsingunum fevnir um skráseting og goymslu av eigaraupplýsingum um skotvápn. Talan er um navn, p-tal og bústað. Harafturat verða persónsupplýsingar brúktir tá søkt verður um vápnaloyvi. Talan er um navn, p-tal, bústaður og møguligar upplýsingar um revsirættarlig viðurskifti, og møguligar persónligar upplýsingar um heilsustøðuna hjá umsøkjaranum frá sakkønum, t.d. løgreglu, lækna, sálarlækna o.a.t. Upplýsingarnar verða nýttar til sambært kunngerð nr. 93 frá 07.09.2016 um vápnaprógv at meta um, hvørt vápnaprógv kann útflýggjast.

**Atgongd hjá øðrum myndugleikum til vápnaskránna**

Við heimild í §2, stk. 2 í K nr. 74/2016 kann løgreglan fáa fjaratgongd til vápnaskránna í sambandi við fyribyrging, eftirkanning, avdúking og rættarsøkjan av lógarbrotum. Løgreglan hevur ikki í løtuni fjaratgongd til upplýsingar úr vápnaskránni, men kann ad hoc biðja um upplýsingar úr skránni.

**Rættindi hjá skrásetta**

Dátuverndarlógin (ll 80/2020) tryggjar skrásettum eina røð av rættindum. Hesi rættindi eru ásett í kapittuli 4 í dátuverndarlógini.

Í mun til vápnaskránna eru hesi rættindi relevant:

- Rætturin til kunning
- Rætturin til innlit
- Rætturin til rætting
- Rætturin til mótmæli
- Rætturin at seta seg ímóti automatiskum avgerðum

Umhvørvisstovan goymir upplýsingarnar við heimild í § 28, stk. 3, nr. 2 í dátuverndarlógini. Ásetingin er soljóðandi: "Skyldan hjá dátuábyrgdarin at strika persónupplýsingar er ikki galdandi, um viðgerðin er neyðug fyri at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum, fyri at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er áløgd."

**Klaga til Dátueftirlitið**
Metir skrásetti, at Umhvørvisstovan ikki viðger persónupplýsingarnar í samsvari við reglurnar í dátuverndarlógini, hevur skrásetti sambært § 76 í dátuverndarlógini rætt til at klaga til Dátueftirlitið. Klagast kann um viðgerð, við at venda sær til Dátueftirlitið á dat@dat.fo ella á telefon +298 309100. Heimasíðan hjá Dátueftirlitinum er www.dat.fo.

**Dátuverndarfólk á Umhvørvisstovuni**
Ynskir tú at gera brúk av omanfyristandandi rættindum, ella hevur tú spurningar til viðgerðina av tínum upplýsingum í vápnaskránni, kann tú seta teg í samband við dátuverndarfólkið (DPO) hjá Umhvørvisstovuni: Malan Gøthe, Teldupostur: MalanG@us.fo